eg eri blivin fúti, verða tær umsitingarligu avbjóðingarnar samsvarandi størri, og tí rokni eg við, at har verða nógvar spennandi uppgávur. Ein tann største avbjóðingin er ivaleyst at fáa tann umsitingarliga partin av løgregluni framhaldandi at virka væl, hóast landalæran setur nakrar forðingar á hesum øki, sigur Karen Marie Olesen.

– Mín fremsta uppgáva sum fúti verður tó at sita við borðendan hjá løgregluni her á landi, og tað er nakað, ið eg skal venja meg við, sigur hon.

### Maðurin kemur seinni

Sum áðurnevnt er Karen Marie Olesen gift, men enn er hon einsamøll í stóra húsunum undir Glaðsheyggi, sum er embætisbústaðurin hjá fútanum í Føroyum.

– Har er eitt sindur tómligt enn, tí maður mín flytur neyvan til Føroyar fyrr enn komandi summar. Hann er lærari, og tað ber illa til hjá honum at fara mitt í einum skúlaári. Tí hava vit býtt innbúgvið hjá okkum í eina helvt, soleiðis at hann hevur nakað eftir á Fredriksberg, og nakað er á veg til mín í Føroyum, greiðir Karen Marie Olesen frá.

Sjálvandi er tað eisini umráðandi, at maðurin hjá nýggja fútanum fær lærarastarv í Føroyum, men tað skuldi verið góð útlit fyri tí.



*- Eg havi fleiri ferðir áður vitjað í Føroyum, og mær hevur altíð dámt væl her. Tí ivaðist eg heldur ikki í at taka av tilboðnum um fútastarvið, tá ið eg fekk tað boðið, sigur nýggi fútin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Seglbáturin settur í eitt fjós

Eitt av størstu áhugamálum hjá Karen Marie Olesen er at sigla, og saman við manninum eigur hon ein 27 fót stóran seglbát, sum tey hava havt stóra gleði av.

– Tað er okkara allarfremsta áhugamál, men nú vit skulu búleikast í Føroyum, er seglbáturin tikin upp á turt, og hann stendur nú í einum fjósi á Sælandi. Gamaní eru Føroyar eitt oyggjasamfelag, men veðrið her á leiðini loyvir ikki sigling við einum slíkum báti, heldur Karen Marie Olesen.

Hon sigur sigur seg tó vóna, at tað fer at bera til hjá teimum á annan hátt at sleppa at sigla við seglum her á landi, og tá ið vit báðir myndamaðurin greiða frá um sluppina Norðlýsið, er tað sum um, at hon ressast eitt sindur í stólinum inni á skrivstovuni á Smyrilsvegi.

— Eg havi bitið merki í hatta skipið, og tað hevði verið framúr, um man slapp ein túr við har av og á, tí tað er ikki tað sama at sigla við motori, sum at standa við einum togenda umborð á einum seglbáti, sigur nýggi fútin.

Eitt annað av áhugamálunum hjá Karen Marie Olesen er rógving, og tað er nakað, sum bæði hon og maðurin hava fingist við í nógv ár í Danmark, og hon væntar, at tað fer hon at halda fram við her á landi.

Starvið sum fúti í Føroyum er sett eftir áramál, og fyribils hevur Karen Marie Olesen bundið seg til at verða her á landi næstu fimm árini, men soleiðis sum hon longu nú tosar um oyggjar okkara, er ikki óhugsandi, at steðgurin kanska verður longdur, hvør veit.

# Tobbi má bíða til mikudagin

**Løgtingslimurin Torbjørn Jacobsen má bíða til komandi mikudag, áðrenn hann fær greiðu á, um tað var í lagi, at fútin tók koyrikortið hjá honum, hóast politiska órinið ikki var tikið frá løgtingsmanninum**

RÆTTARMÁL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tobbi og sakførari hansara, Bjørn á Heygum, hava mótmælt, at koyrikortið hjá løgtingsmanninum varð tikin frá honum, hóast hann framvegis hevði politiskt órin. Málið var fyri í rættinum mikudagin, og avgerð fellur komandi mikudag.




*Torbjørn Jacobsen, løgtingslimur, á veg inn í rættin mikudagin, tá ið málið um heimildina hjá fútanum at taka koyrikortið frá honum, hóast hann hevur politiskt órin, var fyri.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Snýr seg bert um rættin at taka koyrikortið

Bæði varafútin, Finn Ougaard, umboðandi ákæruvaldið og Bjørn á Heygum, sakførari hjá Torbjørn Jacobsen vóru samdir um, at rættarmálið bert snúði seg um, hvørs fútin hevði heimild til at taka koyrikortið frá løgtingsmanninum.

Vegna Tobba segði Bjørn á Heygum, at løgtingsmaðurin ongar ætlanir hevði um at snúgva sær undan eini møguligari revsing, ella at hann royndi at fáa eitt slag av serviðgerð. Talan var bert um at royna, um tað politiska órinið verjir í einum slíkum máli.

Í paragraf 24 í stýrisskipanarlógini stendur: Eingin løgtingsmaður má uttan samtykki løgtingsins verða ákærdur ella fongslaður á nakran hátt, uttan so at hann verður tikin á búri.

Sambært ákærumyndugleikanum er talan í málinum hjá Tobba ikki um, at løgtingsmaðurin er revsaður á nakran hátt, tí hann er hvørki ákærdur ella fongslaður. Hinvegin er talan um eina fyribils frátøku av rættinum til at føra bil, men tað er ikki nøkur revsing sum so, og tí er politiska órinið ikki galdandi í hesum føri, vildi ákærumyndugleikin verða við.

### Forðar fyri luttøku í tingarbeiði

Bjørn á Heygum vísti hinvegin á, at løgtingslimurin ikki var tikin á búri, sum tað stendur orðað, og at frátøkan av koyrikortinum forðaði løgtingsmanninum at taka fult lut í tí politiska arbeiðinum.

Í hesum sambandi vísti sakførarin hjá Tobba á, at løgfrøðisbókmentir siga, at ein slík avgerð ikki má forða einum tinglimi í at røkja sínar politisku uppgávur til fulnar.

– Við tí samferðslukervi sum vit hava í Føroyum, er eingin ivi um, at manglandi koyrikortið er ein stór forðing, tá ið Torbjørn Jacobsen skal røkja sítt politiska starv, tí at verða tinglimur í dag hevur við sær, at tú skalt verða tøkur at kalla alt døgnið, segði sakførarin.

Bjørn á Heygum helt eisini, at tá ið man velur fyribils at taka koyrikortið frá Tobba, vísir, at fútin væntar, at løgtingslimurin missir sítt politiska órin, hóast tað ikki kann sigast við vissu, og at hann síðani verður dømdur treytaleysa frádøming av koyrikortinum. Harvið handlaði fútin út frá, at hann væntaði, at Tobbi verður revsaður, og tí eigur politiska órinið at verða galdandi.

Báðir partar hava nú ført fram síni sjónarmið í sakarmálinum, og nú verður bert bíðað eftir, at dómarin skal koma við sínum úrskurði, og hann verður almannakunngjørdur komandi mikudag klokkan tíggju.